Grækarismessurøða

tann 10. mars 1997 á Vaglinum



Eg fari fyrst, at takka fyrireikarunum fyri álit, at halda Grækarismessurøðuna á Vaglinum í ár.

Føroyskir skótar hava ótroyttiliga skipa fyri Grækarismessuhaldum kring landi í nógv ár. Tit eru fyrireikararnir, og standa nú í rekkju pinnastill, og sleppa ikki at siga eitt orð, men skulu bara lurta. Hoppið endiliga á staðnum!

Hóast stutt skotbrá, so havi eg hug, at siga tykkum nakrar av mínum hugsanum, nú høvi býðst.

Vit bjóða tjóldrunum vælkomin í dag! Um stutta tíð fara vit at hoyra tjaldursklipp - og síggja gar, sum renna kvikkliga og royna at finna sær okkurt goymistað.

Jú eg gleði meg!!

Gerandisdagur føroyinga var í árhundraðir soleiðis, at tey livdu í inniligum samljóði við náttúruna. Náttúran var troytt við umhugsni, og hennara fyritreytir vóru havdar í huga, soleiðis mátti tað verða, skuldu komandi ættarlið hava lív laga. Føroyingurin var sanniliga umhvørvisumsitari!

Nógv er broytt tey seinastu, lat okkum siga 75 - 100, árini.

Nútímans skynsamilig náttúruumsitting merkir, at vit:
fara væl um tað *fjølbroyttu* føroysku náttúruna
betra livikorini hjá villum plantum og djórum



Fyri mær at síggja, er ein hin størsti umhvørvistrupulleikin í løtuni tann, at vit hava skeivan hugburð mótvegis náttúrun, sum um vit hava gloymt, at náttúran, og tað sum í henni býr, er í veruleikanum, tað einasta vit hava at dúva uppá, tað stuttu tíð vit eru her.

Eg ivist ikki í, at hevði hvør einstakur av okkum ruddað betur upp eftir okkum, har vit búleikast og ferðast, so høvdu vit sæð stóran mun eftir stuttari tíð.

Og tað ber til - ferðast vit kring landi, so sæst, at kommunustýrini taka umhvørvismál í álavara, har er reint og ruddiligt á almennum økjum, sum kommunan hevur ábyrgdina av. Fólk halda sítt privata øki reint og ruddiligt.

Jú ein part kunnu so tú og eg gera betur, men Føroya Landsstýri hevur eisini til upp-gávu at skapa fyritreytir.

Føroya Landsstýri hevur undirskrivað fleiri enn 10 millumtjóðasáttmálar viðvíkjandi umhvørvismálum.

Við millumtjóðasáttmálunum koma londini, sum undirskriva, ásamt um, at nakrar reglur eru galdandi.

Fleiri av sáttmálunum, sum Føroyar hava undirskrivað, hava lítlan ella ongan týdning fyri Føroyar. Soleiðis meint at:

Fleiri av sáttmálunum seta ikki nøkur stórvegis krøv til okkara Landsstýrið, og teirra umhvørvispolitikk, tí sáttmálarnir í fleiri førum ikki eru serliga viðkomandi fyri okkara umhvørvistrupulleikar.

Nøkur dømi:

Genevé sáttmálin um luftdálking, sum ferðast um landamørk,

Rammusáttmálin um veðurlagsbroytingar,

Washington sáttmálin um keyp og sølu av villum djórum og plantum, sum eru hótt,

Helsingforssáttmálin um brúk og vernd av áum og altjóða vøtnum, sum røkka um landamørk.

So eru tað aðrir viðkomandi sáttmálar, sum eru undirskrivaðir, men okkara politikarar hava als **ONKI** gjørt fyri at fylgja málinum upp, og halda orð.

Nøkur dømi:

Sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldni:

Sáttmálin um fyrivarni:

Rio sáttmálin: Í juni 1992 var ST ráðstevna í Rio de Janero. Umboðini fyri londini samdust um, at innan 1. januar 1996 skuldi sokallaðar LokalarAgenda 21 ætlanir gerast har umhvørvis kósin fyri tað komandi 21. øld verður niðurfeld á blað.

Føroyar vóru umboðaðar í Rio - men onki er hoyrt um, hvat Føroyar bundu seg til á ráðstevnuni. Bæði framkomin og minni framkomin lond hava gjørt Agenda 21 ætlanir og arbeiða eftir teimum.

OSPAR sáttmálin, skal verja okkara havumhvørvi móti dálking. Í eini møguligari komandi oljuvinnu mugu vit seta krøv til, hvat kann leiðast út í havið. Enn er sáttmálin ikki galdandi í Føroyum, hóast hann hevur ligið á borðinum í Landsstýrinum í fleiri ár.



Millumtjóðasáttmálar, sum Landsstýrið undirskrivar, eru ein partur av umhvørvisumsitingini, men tað nyttar ikki nógv, at tað er gjørt eitt gott skriviborðsarbeiði.

Eg nevndi Rio sáttmálan fyri løtu síðani. Kjarnan í sáttmálanum er, at øll; børn, eldri, kvinnur og menn luttaka í tilrættarleggingini av umhvørvisumsitingini.

Hugsanin er, at tá hugskotini til betran á umhvørvisøkinum kemur, har trupulleikarnir eru, so er munandi lættari at loysa trupulleikarnar í verki.

Ein týðandi avbjóðing í framtíðini er sostatt at fáa fólk við í umrøðuni av umhvørvinum, og at millumtjóðasáttmálar og galdandi lóggáva verða framdar í verki, har øll kenna, at tey kunnu gera nakað gott í síni heimbygd.

Umhvørvismál er abyrgdin hjá okkum øllum.

Eitt orðatak sigur: »at ongin gjørdi eitt størri mistak enn hann, sum helt, at hann onki kundi gera, tí tað munaði so lítið«.

Aftur til tjaldri – okkara tjóðfugl: Vit hava ábyrgdina av, at tjøldrini hava tað gott meðan tey vitja í Føroyum – vit kunnu gera nakað við lesullina, sum sløðist í bø og haga og gerst teimum ein bani!

Minnist til at náttúrurikidømi hava vit bara til láns frá okkara eftirkomarum.

Takk fyri, at tit læntu mær tykkara oyra eina lítla løtu.

Durita Brattaberg

tíðindablaðið
SOSIALURIN
BOX 76 · 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64



Ja!

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum – og fái blaðið **5 ferðir um vikuna.***

☐ **Haldarar í Føroyum:** **235,-/ársfj.**
☐ **Haldarar í Danmark:** **425,-/ársfj.**
☐ **Haldarar í Danmark:** (5 bl. í senn): **340,-/ársfj.**
☐ **Onnur lond:** **Ymiskir prísir**

Til ber altíð at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum

Navn:
Bústaður:
.....
Postnr., bygd/býur:
.....
Tlf.: **Undirskrift:**

PIZZA-VINIR

Hevur tú hug at fáa eina ella fleiri **PIZZA** inn á gólvið, so ring **tlf. 18866**, og tú hevur PIZZA'ina innan ein tíma.

Vit í **PIZZARIA** royna altíð at hava kostnaðin so lágan sum møguligt, soleiðis at kundin bert rindar 30 kr. fyri heimkoyringina. *Hetta tilboð er tó bert galdandi fyri viðskiftafólk í Tórshavn.*

Vit vóna, at hetta tilboð kemur væl við.

PIZZARIA
Tlf. 18866